# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Kristina Sofía Ferjá, vanliga kalla Dinnafía, frá Gjógv** andaðist mánadagin 8. september á Røktarheiminum Mørkini í Streymnesi, 91 ára gomul. Bønarhald verður á Mørkini hóskvøldið 11. september klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Gjáar kirkju fríggjadagin klokkan 14. Tey, ið vilja minnast Dinnufíu kunnu lata eina peningagávu til Gjáar kirkju. Konta í peningastovnunum.

**Edmund Jensen á Sandi**, sonur Fríbjørg og Patsy Jensen, andaðist í Keypmannahavn sunnudagin, 21 ára gamal. Jarðaferðin verður lýst seinni.

**Dagurin**
**12. september. Guido**, deyður í 1012. Guðrøkin ungur maður, sum gjørdi fleiri pílagrímsferðir. Heimafturkomin doyði hann í Anderlecht í Hálandi av stravnu ferðum sínum. Fleiri undurverk hendu við grøv hansara, og tí varð hann lýstur halgimenni.

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!

## Minningarorð um beiggja mín

# Jóan Hendrik Húsgarð

* 11. septembur 1965 - † 1. desembur 2007



Nú tað nærkast føðingardegnum hjá Hendrik - 11. septembur - bíðst mær eitt høvi at skriva hesi tørføru minningarorð. Eg havi mangan hugsað, hví Hendrik skuldi fáa so harða lagnu. Fyrst teir stóru trupulleikarnir við at fáa eitt barn, ið m.a. hevði við sær missin av lítlu Barbaru og síðan tað stríð og vónloysi, ið stendst av at fáa eitt alt ov tíðliga føtt barn. Tí helt eg, at tað kundi ikki passa, tá eg tann dagin í juli 2007 fekk at vita, at Hendrik hevði fingið krabbamein. Tað kundi ikki bera til, at Hendriksa familja aftur varð rakt.

Síðan havi eg eisini mangan hugsað, at hóast Hendrik var alt ov ungur, nú hann fór, so hava vit systkini hóast alt havt eitt gott lív. Hendrik var yngstur av mínum trimum stórubeiggjum og tí høvdu vit náttúrliga eitt tætt samband. Vit vuksu upp í Gundadali, fró og glað, og uttan stúran av nøkrum slag - ja, kanska Hendrik var tann glaðasti av okkum øllum. Nógv góð minnir renna fram fyri meg og altíð var Hendrik í góðum lag og skjótur at flenna. Eisini hevði hann gott tol og gav sær ofta góðar stundir at spæla við lítlusystir, hóast fýra ár var millum okkum. Í dag eri eg glað um, at síggja hendan eginleika aftur í mínum egna soni.

Sum smádrongur fór Hendrik at spæla hondbólt við Neistanum. Hann gjørdist málmaður, og tað gekk so mikið væl, at hann eitt skiftið var við á ungdómslandsliðnum. Eftir loknan fólkaskúla fór Hendrik fyrst á Tekniska skúla og síðan til Danmarkar, har hann læs maskinverkføði á DTH. Eisini har spældi hann hondbólt, og var tað við IF Føroyar. Í 1991 møtti Hendrik Patriciu, ið er uppvaksin í Keypmannahavn. Tey bæði fluttu saman og nøkur ár seinni valdu tey at royna nakað nýtt og fluttu tí til Skagen. Hendrik hevði fingið starv hjá Alpha Diesel (seinni MAN Diesel A/S) í Fredrikshavn, meðan Patricia arbeiddi innan heilsuverkið. Eg hugsi, at tey bæði høvdu nøkur góð ár saman, har tey ferðaðust nógv, og við at flyta til Skagen, partvís fylgdu teirra dreymum. Tað er kanska meiri, enn fleiri okkara gera.

Men lagnan var hørð við teg Hendrik, og tað var alt ov stokkut einans at fáa fýra ár saman við tíni elskaðu lítlu Rebeccu. Tíðin eftir at tú var blivin sjúkur gekk eisini alt ov skjótt og tíverri gekk alt so illa, sum tað kundi. Tí siti eg í dag við eini kenslu av, at eg ikki fekk tosa nokk við teg. Men eg fekk sagt tað, sum var mest týdningarmikið, og eg fekk sagt farvæl. Hóast hvørgin okkara segði tað, so vistu vit bæði, at tað var eitt seinasta farvæl. Júst eina viku seinni vart tú farin.

Tá eg fekk deyðsboðini av Hendrik, tóktist mær so hjartaliga synd í honum, at hann skuldi fara einsamallur inn í deyðan. Men tá legði eg til merkis hetta vers, ið stóð í álmanakkanum henda sama dagin, og sum var mær til stóran ugga:

Eg eri ikki einsamallur, tí Faðirin er við Mær. Jóh. 16,32

Góða Patricia og Rebecca, mamma og pápi. Tit hava mist tykkara høgt elskaða mann, pápa og son. Má Harrin styrkja tykkum í tykkara stóru sorg og vælsigna tykkum í árunum sum koma.

Ærað verið minnið um Hendrik.

**Systir tín**



# Møtir í skúlanum í Vestmanna

**Í vikuskiftinum vera møtir í Auluni í skúlanum í Vestmanna. Tað eru teir somu sum høvdu møtir í apríl mánað í ár: Rógvi Joensen, Bogi Simonsen, Petur Mohr og Petur á Roykheyggi**

Hesaferð vera tvey møtir, og byrjað verður leygarkvøldið 13. september kl 20, og hildið verður fram sunnukvøldið 14. september kl. 18.

Kristina Bærnedsen og Asta Højgaard vera við á møtunum við sínum framúrskarandi røddum og sangkynstri. Tær eru kendar frá festivalum og størri sangmøtum. Talarnir hesi møtir vera klaksvíkingarnir Rógvi Joensen, Bogi Simonsen og Jákup Hansen, eins og onnur úr Vestmanna.

Fyrireikararnir vóna at síggja so nógv fólk sum til ber. Endamálið við møtunum er at boða gleðiboðskapin um Jesus Kristus.

Eftir hvørt møtið verður ein kaffimunnur við onkrum afturvið, og høvið verur til samtalur og forbøn.

Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møtir.